ÍTRÓTTARBLAÐIÐ
Sosialurin 4. september 2009

# Mugu taka av møgu-leikunum



**Brian Kerr er greiður um, at talan aftur er um trupla uppgávu hjá føroyska landsliðnum. Men hann er sannførdur um, at vit eisini hava okkara møguleika við dystinum**



jakup@sosialurin.fo
Jákup Mørk


Eftir at hava staðið við stýrisvølin í tveimum heimadystum, skal Brian Kerr í annaðkvøld fyri fyrstu ferð leiða føroyska fótbóltslandsliðið á útivølli.

Móti bæði Serbia og Fraklandi sóu føroysku áskoðararnir eitt føroyskt lið, sum í størri mun enn fyrr tordi at koma fram á vøllin, uttan at hetta kostaði í verjupartinum, og sum tí eisini kom til nógv fleiri møguleikar, enn vit vanliga hava sæð.

Og hóast talan nú er um dyst á útivølli, so roknar Brian Kerr ikki við, at føroyska uppleggið verður so nógv øðrvísi.

- Talan er altíð um truplar uppgávur, tá vit eru á útivølli, men eg rokni nú ikki við, at vit spæla so øgiliga nógv øðrvísi, enn vit hava gjørt hinar dystirnar.

- Tekur tú útidystirnar í fjør móti Litava og Serbia, so stóðu vit okkum sera væl í verjupartinum, og tað er sjálvandi umráðandi, at vit halda fast um tann partin. Men samstundis mugu vit tora at taka av, tá møguleikin er at fara í álop. Har var eg hampuliga væl nøgdur við dystirnar móti Serbia og Fraklandi, hóast vit móti Fraklandi vórðu trýstir rættiliga langt aftur á vøllin.

## Sterkir eysturríkar

Hóast Eysturríki á pappírinum ikki er heilt so sterkt sum Serbia og Frakland eru tað, so ivast Brian Kerr ikki í, at talan er um ríkiliga sterka mótstøðu.

- Teir hava skift nógv út, men teir hava kortini havt fleiri góð úrslit. Teir vunnu 2-1 á heimavølli móti Rumenia, og móti Serbia taptu teir 1-0 á útivølli, hóast teir høvdu uppiborið betur. Og tú sært eisini, at teirra lið standa seg væl í Europa.

- So tað er eingin ivi um, at tað er eitt lið, sum fer at gera okkara uppgávu serstakliga trupla, sigur Brian Kerr, sum tó als ikki vil útiloka eina føroyska sensatión.

## Allir útidystir eru serligir

Tá talan er um Eysturríki, so er talan um serligan dyst fyri Føroyar og føroyingar. Men sjálvt um hann kennir søguna, so vil Brian Kerr ikki gera hendan dystin til so øgiliga meira enn aðrir landsdystir.

- Í mínari verð eru allir landsdystir serligir. Tú hevur kanska einar 8-9 av slagnum um árið, og hetta er eisini mín fyrsti útidystur, so sjálvandi er tað nakað serligt.

- Søgan við Landskrona er sjálvandi har, og vit hava jú bæði Abraham og Jens Martin í venjarahópinum, so teir hava verið stjørnurnar, sum fólk hava vilja sæð her.

- Í so máta leggur tann dysturin saman við javnleikinum í fjør kanska eitt eyka trýst á teir. Men mínir spælarar gleða seg í øllum førum til uppgávuna, og eg haldi, at allir verða tøkir. Heilsutoymið hjá okkum hevur í øllum førum gjørt eitt sera gott arbeiði við Fróða og Súna, og so mugu vit síggja, um tað eisini eydnast at fáa Johan klára.

**Brian Kerr væntar ikki, at føroyska uppleggið til dystin móti Eysturríki verður so nógv øðrvísi, enn tað hevur verið undanfarnu dystirnar**

- Men undir øllum umstøðum verður tað eitt lið, sum gleðir seg til avbjóðingina, sum vit hava í morgin, sigur Brian Kerr.

# Kendasta fótbóltshúgvan nakrantíð

**Stóra eysturríkska blaðið, Der Standard hevur samrøðu við Jens Martin Knudsen**



heris@sosialurin.fo
Heri Simonsen


- Tann helst kendasta húgvan í fótbóltssøguni er lend í Graz, saman við eigara sínum, Jens Martin Knudsen. Soleiðis byrjar Der Standard greinina. Víðari skrivar blaðið, at Jens Martin hevur legendarisku húgvuna við sum ein "talisman" - eydnugrip, og leggur blaðið aftrat:

- Henda topphúgvan hevur seinastu 19 árini verið ímyndin av tí størstu skommini í eysturríksku fótbóltssøguni. Tann 12. september í 1990 megnaðu Toni Polster, Andreas Herzog og hinir á eysturríkska liðnum ikki, at fáa bóltin framvið manninum við hvítu húgvuni, sum tá koyrdi truck á einum fiskavirki í Runavík. Blaðið undirstrikar, at sigurin í Landskrona er "ein neues National-Epos" - ein nýggj tjóðarsøgn í Føroyum.

Í viðtalu við Der Standard slær Jens Martin fast, at tað er ikki lætt at skora mál ímóti Føroyum.

- Vit hava fingið góð úrslit í HM-undankappingini. Vit hava ongantíð tapt við meir enn tveimum málum. Okkara verja stendur væl. Eysturríki sleppur at arbeiða hart, um teir ætla at vinna dystin, staðfestir Jens Martin yvirfyri Der Standard.

Víðari sigur Jens Martin við eysturríkska blaðið.

- Eysturríkar fara at leggja eitt stórt trýst á, og fara at royna at fáa eitt skjótt mál. Men vit hava møguleikan fyri einum góðum úrsliti. Eysturríkar hava ikki so nógvar rutineraðar spælarar hesaferð. Har eru seks ella sjey spælarar burtur, sum spældu ímóti okkum í fjør. Men teir sum eru komnir á liðið eru alt góðir spælarar, undirstrikar Jens Martin, sum hevur sæð sjónbond av eysturríkska landsliðnum.



Jens Martin Knudsen við kendu topphúgvuni, tá hendan varð sýnd fram á Leopold Museum í Wien